## VEÐRIÐ




**Mikudagin, hósdagin og fríggjadagin**
Skýggjað og ælaveður við hita um 10 stig. Lot til andøvsgul av eysturi og landsynningi, 3-8 m/s.

# Oljuprísurin á veg upp



**Eftirspurningurin eftir olju er ongantíð minkaður so skjótt síðani 1981, og stórt útboð og fullar goymslur ørkymla marknaðin**

OLJUPRÍSUR
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Norska StatoilHydro hevur verið millum teirra, sum hava væntað lítlar broytingar í oljuprísinum, men nú er e4isini tað felagið farið at varskógva sínar íleggjarar um, at prísurin kanska fer at hækka meiri enn higartil hildið.

-Vit hava kunnað teir um, at vit síggja ongan bata í heimsbúskapinum, men at dstøðan er merkt av dapurskygni. Harumframt hava vit sagt, at tað er eftir øllum at døma ikki eftirspurningurin, sum fær prísin at hækka, sigur Lars Troen Sørensen, leiðari á íleggjarakunningardeildini hjá StatoilHydro, við Aftenposten.

Í gjár bleiv norðsjóvarolja, sum skal latast í juli, seld fyri meiri enn 57 dollarar fyri tunnuna, og tað var 1,1 dollara ella á leið tvey prosent oman fyri prísin fríggjadagin.

### Minni etirspurningur

Fyri trimum mánaðum síðani lá oljuprísurin um 40 dollarar fyri tunnuna, men síðani er hann støðugt hækkaður. Í síðstu viku almannakunngjørdi Altjóða Orkustovnurin IEA eina frágreiðing, sum vísti, at eftirspurningurin eftir olju er ongantíð minkaður so skjótt síðani 1981. Hetta samsvarar væl við fráboðanir frá OPEC og amerikanska orkumálaráðnum.

Greinarar, sum Aftenposten hevur tosað við, siga, at tað er í stóran mun spekulantar, sum trýsta oljuprísin upp. Ein av greinarunum, Thina M. Saltvedt, sigur við blaðið, at tað er ikki samsvar á marknaðinum, tí prísurin hækkar, hóast útboðið er stórt og goymslurnar fullar. Hon sigur, at so leingi hendan støðan stendur við, skal lítið til at ávirka oljuprísin.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -2 |
| Nuuk | -3 |
| Qaqortoq | 1 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 10 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 12 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 18 |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 12 |
| Moskva | 23 |
| Berlin | 22 |
| Warzawa | 23 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 19 |
| Paris | 10 |
| Madrid | -- |
| Róm | 16 |
| Malorca | 20 |
| Athen | 19 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 22 |
| Beijing | 21 |
| New Dehli | 39 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 16 |
| New York | 31 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 14 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 34 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 28 |

### LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




Eitt lágtrýst, 1003 hPa, vestan fyri Skotland flytur seg norðureftir og grynnist. Óstøðug luft við ælaveðri ferðast móti Føroyum av landnyrðingi og eysturi.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 17/05 kl. 06⁰⁰ – 18/05 06⁰⁰. Hitin í gjár: 8,8°
Minsti hiti máldur í mai: -8,7° - Mesti hiti máldur í apríl: 12,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 17/05 kl. 06⁰⁰ – 18/05 06⁰⁰.
Avfallið higartil í mai: 43 mm




## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 14.mai | Mánin longst frá jørðini |
| 17.mai | Seinna kvarter |
| 24.mai | Tendring |
| 26.mai | Mánin næstur jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 19. mai | 03:17 | 15:36 | 02:17 | 14:36 | 02:32 | 14:51 | 05:17 | 17:36 | 06:17 | 18:36 | 01:32 | 13:51 | 00:32 | 12:51 | 03:32 | 15:51 | 04:32 | 16:51 | 03:02 | 15:21 | 04:17 | 16:36 |
| 20. mai | 03:55 | 16:14 | 02:55 | 15:14 | 03:10 | 15:29 | 05:55 | 18:14 | 06:55 | 19:14 | 02:10 | 14:29 | 01:10 | 13:29 | 04:10 | 16:29 | 05:10 | 17:29 | 03:40 | 15:59 | 04:55 | 17:14 |
| 21. mai | 04:34 | 16:55 | 03:34 | 15:55 | 03:49 | 16:10 | 06:34 | 18:55 | 07:34 | 19:55 | 02:49 | 15:10 | 01:49 | 14:10 | 04:49 | 17:10 | 05:49 | 18:10 | 04:19 | 16:40 | 05:34 | 17:55 |
| 22. mai | 05:17 | 17:40 | 04:17 | 16:40 | 04:32 | 16:55 | 07:17 | 19:40 | 08:17 | 20:40 | 03:32 | 15:55 | 02:32 | 14:55 | 05:32 | 17:55 | 06:32 | 18:55 | 05:02 | 17:25 | 06:17 | 18:40 |
| 23. mai | 06:05 | 18:30 | 05:05 | 17:30 | 05:20 | 17:45 | 08:05 | 20:30 | 09:05 | 21:30 | 04:20 | 16:45 | 03:20 | 15:45 | 06:20 | 18:45 | 07:20 | 19:45 | 05:50 | 18:15 | 07:05 | 19:30 |

